## Brann vann seg víðari

Eitt annað norðurlendskt lið hevur spælt seg í 3. innleiðandi umfarið. Tað er Brann úr Bergen, sum í gjárkvøldið tapti 2-1 á útivølli móti Ventspils úr Letlandi. Á heimavølli hevði norska liðið vunnið 1-0. Brann minkaði beinanvegin í 2. hálvleiki í gjárkvøldið um munin til 2-1, og útivallarmálið gjørdi av, at tað verður Brann sum skal spæla í 3. innleiðandi umfari. Tá verður mótstøðan ivaleysa stór, tí Brann skal spæla ímóti franska Olympique de Marseille. Í kvøld fer svenska meistaraliðið IFK Goteborg at spæla á útivølli ímóti Basel. Í Goteborg var úrslitið 1-1.



## AaB nærri teimum stóru

Vónin hjá øllum meistaraliðum er at sleppa upp í part í bólkaspælinum í europeisku meistarakappingini. Danska AaB hevur eina ferð luttikið í hesi kappingini, og vánirnar fyri, at tað aftur skal eydnast hesa ferð, minkaðu ikki í gjárkvøldið. Lutakastið hevur lagað tað soleiðis, at AaB skal spæla ímóti samantalda vinnaranum í uppgerðini millum litaviska Kaunas og Glasgow Rangers. Skotska liðið varð mett at vera favorittur og tann størra forðingin hjá AaB. Í gjárkvøldið varð tað greitt, at tað verður Kaunas, sum AaB skal spæla ímóti. Fyri viku síðani endaði dysturin í Glasgow málleysur. Í gjárkvøldið vann Kaunas 2-1 á heimavølli, og harvið er tað greitt, at tað verður litaviska liðið, sum skal spæla ímóti AaB. AaB verður ikki liðugt í 2. innleiðandi umfari fyrrenn í kvøld. Men tað skal ganga verri enn illa niðri í Bosnia, um tað ikki skal eydnast AaB at spæla seg víðari. Á heimavølli vann AaB 5-0 á Modica.



Seinast Ike var í Føroyum spældi hann við NSÍ. Nú er leikaraloyvi hansara flutt til AB

Savnsmynd

# 63 leikarar fluttu í juli

**57 mans og seks kvinnur skiftu feløg í juli, og ikki allar hesar flytingar hava verið so nógv umrøddar. Millum annað er nigeriumaðurin Ike skiftur frá NSÌ til AB**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Fótbóltssambandið hevur lagt eitt fullfíggjað yvirlit yvir allar leikaraflytingarnar, sum vórðu framdar í julimánað út á heimasíðu sína. Og við at telja kann staðfestast, at 63 flytingar vóru framdar. 57 mans og seks kvinnur skiftu feløg.

Mest umrøddu flytingarnar hava vit hoyrt um: Jákup á Borg frá HB til B36, Røgvi Jacobsen frá Hødd til KÍ og Súni Olsen úr Viborg til B36. So eru eisini aðrar flytingar, ið minni hevur verið at hoyrt um. Millum annað, at gamli HB málverjin Bárður Johannesen hevur flutt sítt loyvi frá EB/Streymi til HB, og at AB málverjin Magnus Poulsen hevur flutt sítt loyvi frá AB til EB/Streym.

### Ike til AB

Eisini eru aðrar leikaraflytingar, ið vekja ans. Serliga at Ikechuckwu Onyema – ella bara Ike – sum kom til NSÍ í 2004, hevur skift til AB í summarsteðginum.

Ikechuckwu Onyema kom til NSÍ til seinnu hálvu í kappingarárinum 2004. Tað ljóðaði lovandi tá hann kom, tí maðurin hevði spælt tveir dystir á U21-landsliðnum hjá Nigeria og tveir dystir hjá U23-landsliðnum, har hann eisini hevði gjørt tvey mál. Og tað byrjaði eisini væl, tí í teimum sjey dystunum, Ike spældi í 2004, gjørdi hann fýra mál.

Kappingarárið 2005 spældi hann eisini við NSÍ, men síðani hevur ikki verið nógv at hoyrt til mannin, sum fór av landinum. Spæliloyvið hevur tó allatíðina ligið í NSÍ, men sum skilst hevur Ike spælt nakað av fótbólti í heimlandinum.

Nú er Ike aftur í Føroyum. Stóran part av árinum í ár hevur hann nú vant á Argjum, og nú er spæliloyvið eisini flutt úr Runavík til Argir. Enn vantar tó nakað av pappírsarbeiði – arbeiðsloyvi og annað skilst – áðrenn Ike er tøkur hjá AB.

Av Argjum lata tey bara væl at avrikunum hjá nigeriumanninum undir venjing, og rokna tey við, at hann kann vera eitt fínt íkast til hópin, sum nú hevur vunnið sær fremsta sessin í 1. deild.

### Nagy til Ungarn

Eitt annað áhugavert skifti er, at Tamas Nagy er farin aftur til heimlandið. Nagy spældi við B36 fyrru hálvu, men er farin aftur til Ungarn. Spæliloyvið tók maðurin við sær, og tað liggur nú hjá einum felag, ið eitur REAC Sport KFT.

Í Klaksvík hava tey styrkt um álopið við Røgva Jacobsen. Men ein annar maður hevur eisini flutt leikaraloyvið heim í summar. Hesin er Erling Fles, sum eisini spældi ein dyst við KÍ fyri summarsteðgin. Hann lesur annars niðri og er toppskjútti hjá ÍF Føroyum.

# Ríða NM í morgun

**Í morgun fór føroyska landsliðið í íslandsríðing í eldin. Tá byrjaði Norðurlanda-meistaraskapið 2008, Seljord, Noreg av álvara**

RÍÐING
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Spenningurin var í hásæti, tá kappingin varð sett kl 9.00 í morgun. Føroyska liðið er væl fyrireika og fyri fyrstu ferð umboðað við heili sjey luttakarum á egnum rossum. Tað boðar føroyska landsliðið í íslandsríðing frá í tíðindaskrivi, sent miðlunum seinnapartin í gjár.

Mánadagin var djóralæknakanningin, ið rossini skulu megna, uttan nakra viðmerking, fyri at sleppa at kappast. Skógvakanningin var sunnudagin og tað gekk væl hjá liðnum. Tíð er sett av til øll liðini á kappingarvøllunum og á venjingarvøllunum. Í gjár var endaliga venjingin áðrenn kappingin byrjar. Føroyska liðið havt umleið ein hálvan tíma at venja á høvðusvøllinum hvønn dag.

### Byrjaðu í morgun

Veðrið hevur verið sera gott og hitin øgiligur – millum 28-30 stig. Men nú kappingin byrjar er hitin niður á umleið 14 stig og er hetta bert til fyrimun fyri rossini.

Tey, ið fyrst fóru á banan í dag vóru hesi: í fjórgongd, har tey vísa arbeiðstølt, trav, tvísspor, fet og skjótt tølt byrjar Elin Tindskarð á Marel frá Feti. Síðani kemur Napoleon Falkvard Joensen á Mörðuri frá Miðhjáleigu. Í hesari grein eru 27 luttakarar.

Seinni í dag skuldi Vinjar Falkvard Joensen kappast á Vörður frá Efri-Rauðalæk í fjórgongd fyri ungríðarar. Har kappast 11 luttakarar.

Síðsta greinin føroyingar kappast í í dag er skeið. Her skulu Heri Djurhuus Dahl á Leiknir frá Stóru-Ásgeirsá og Jóanis í Hoygarðinum á Heklugígur frá Langholti kappast við 18 aðrar luttakarar.

Stórar vónir eru til Kristfríð Dam Jacobsen á Drotning frá Leirubakka. Tær skulu ikki kappast fyrr enn hósdagin. Við í tí bólkinum er Poli Joensen á Mørður frá Miðhjálegu. Hesin hesturin hevur eisini góðar eginleikar. Tey kappast í tølt. Her skulu tey vísa eina síðu spakuligt tølt, síðani vísa ferðaøkingar og at enda ein umgang skjótt tølt.

Hildur á Plógv skal kappast á Rasmes móti unglingaríðarum úr øðrum norðanlondum.

